# beiðspláss



*- Tað er eitt praktiskt problem or whatever. Eg eri troyttur av at verða turistur. Tá eg komi heim til Føroyar, sum eg ofta geri, so hví ikki hava eini hús at koma til, heldur at búgva hjá pápa mínum, sigur Teitur Lassen*

og eg eri ein persónur, sum seti ting í verk, og eg havi eginleikan til tað, hóast eg ikki geri nakað líknandi í løtuni, sigur hann.

Prátið fellur síðani inn á hvussu týdningarmikið tað er, at hava røttu fólkini rundan um seg. Teitur heldur, at í einum og hvørjum yrki eigur mann ikki at vera bangin fyri at samstarva við onnur, um ein kann blíva betri til sítt yrki.

- Um tú opnar eina matstovu, hví skal tú velja vínið til matarskránna, tá ein annar dugir nógv betri at velja vín enn tú?, spyr Teitur. Teitur veit hvat hann snakkar um, tí sjálvur hevur hann fólk rundan um seg, sum hann ráðførður seg við.

Fyri Teit er tað týdningarmikið hesi fólk, kenna hann, vita hvagani hann kemur og hava líknandi sjónarmið.

Spurdur um hann hevur nakran mentor, so sipar hann til framleiðaran Rupert Hine. Hine er fyri Teit ein tónleika abbi, ið hevur lært Teit mangt og hvat í samband við tónleik.

## Framtíðin

Umframt at spæla á Gøtusandinum til ársins G! Festival, arbeiðir Teitur hart við at etablera seg í Bretlandi. Hóast hann hevur búð í Onglandi í seks ár, so er hann ikki so kendur á bretsku oynni. Hetta skal helst broytast, og konsertferðin hann er á í løtuni, er dømi um tað. Eitt annað ítøkiligt dømi um hesa raðfesting er, at ein uppsamlingsfløga av Stay Under the Stars og Poetry & Aeroplanes útgávunum verður givin út í Bretlandi seinni í ár.

Tann 29. juni gevur plátufelagið hjá Teiti, A&G Record, út singulina, "The girl I didn´t know" í EP formati, tó er videolagið til hetta lagið longu komi út, og tað kann síggjast á YouTube.

Fólk kunnu eisini longu nú gleða seg, tí Teitur er farin til verka at gera løg til hansara komandi útgávu, sum eftir ætlan skal koma út í 2010.

# Framførsla fyri sansirnar



TÓNLEIKUR

*Ólavur Guttesen*
*ollisweet@hotmail.com*

Sum partur av útgávuni "The Singer" hjá Teiti Lassen, er okkara fremsti Singer farin undir eina konsertferð, sum byrjaði 14. mai í Brighton í Onglandi og heldur fram til 8. juni í Aberdeen í Skotlandi.

Mánakvøldið 18. mai var so triðja framførslan á hesari konsertferð. Hesa ferð í Leeds í miðastóra – men intima - Brudenell Social Club. Uttanfyri klubban sóust plakatir av Teiti, og fleiri fólk høvdu leita sær til klubban hetta góðveðurskvøldið.

Við sær á hesari konsertferð hevur Teitur eina manning av sera dugnaligum bretskum tónleikarnum, ið eru samansettir serliga til hesa konsertferð. Roy Martins á trummum, Dan McMinna á bass og Richard Causom á keyboard.

Eftir ætlan skuldi Teitur byrja klokkan 22.00, men næstan ein tíma seinni, nærkaðist tað, sum eg eri komin fyri at hoyra. Tað var sanniliga eisini uppá tíðina, hugsaði eg, tí heili tríggir bólkar hitaðu upp fyri Teiti. Tí var tað frøiligt, at síggja The Singer trína uppá pallin. Einsamallur, við sínum elskaða gittara. Hann stóð bara har frammanfyri áhoyraranum.

Tað var eisini ein ávísur spenningur í luftini. Tónar vóru ikki fyrst at hoyra, men ein áheitan frá Teiti til fólk um at koma fram at seta seg frammanfyri pallin og lurta.

Grundin var løgd fyri eina intima og áhugaverda framførslu.

## Bjargaði kiksinum

Fyrsta lagið sum Teitur framførdi var "I was just thinking". Hann greiddi frá, at hann skrivaði lagið til damuna, sum hann hevði, tá hann var 17 ára gamal. Hon búði í Leeds, at hann sendi sangin til hana á einum kasettubandið, "so sangurin er oftan spældur í Leeds fyrr", segði Teitur til stóra frøi fyri áhoyranum, sum vóru blivnir fleiri og fleiri, sum kvøldið leið.

Tey vóru komin fyri at hoyra ein "never less than extraordinary" entertainara, sum víðagitna blaðið The Guardian tekur til.

Síðani kom bassleikarin á pallin, tá lagið "Josephine" var á skránni. Áðrenn fyrstu tónarnir í lagnum, heitti Teitur enn einaferð, næstan sum ein prædikumaður á einum friðarligum møti, áhoyrarnar um at koma fram og sessast frammanfyri pallin. Hesaferð fyltist gólvið við enn fleiri fólkum.

"The girl I don´t know", ið er fyrsta singulin á fløguni, sum verður givin út í Bretlandi, stóð so fyri skotum við fullum orkestri, og ræsttiligt lív kom í áhoyrarnar, og tað tóktist sum kemi'inn millum tónleikarnar og áhoyrarnar var ógvuliga góð.

"Legendary afterparty" og "Start wasting my time" blivu síðani spældir í góðum Teitur style, men at bólkurin er nýliga samanspældur kom týðiliga fram til lagið "We still drink the same water". Lagið var ikki meir enn byrjað, so gekk galið. Hvat akkurát fekk eg ikki ordiliga við, men so mikið galið, at teir máttu byrjað lagið umaftur. Eg havi verið til konsertir har slík er hent, og tað hevur mangan haft ein píniligan stemning við sær. Men Teitur, so sjarmerandi sum hann er, segði við einum skeivum skálkasmílið, at hetta var bert triðja framførslan higartil, so "hetta royna vit bara umaftur". Og framførslan helt á, sum um at einki var hent. Waw!

Sum til øll hini løgini greiddi Teitur frá meiningini ella boðskapinum aftanfyri lagið, og tað eydnaðist heilt væl, tí tað tóktist sum um at Teitur ikki bert var komin at framføra sínar sangir og vóna, at fløgan seldi væl aftaná konsertina, men at geva fólkunum eitt upplivilsi á einum intinum støði. Og tað má sigast at, hann kom ógvuliga væl frá tí.

Knappiliga legði eg til merkis, at servitrisan í klubbanum steingir barruna. "Er hetta ein partur av showinum", hugsaði eg. Tí lagið "Caterine the waitress" júst var byrjað, men allarhelst var tað bara vanlig afturlatingartíð. Men tá ein skal ummæla, fara slíkar hendingar ikki bara framvið, og um ikki áhugavert fyri nakran annan, so fyri meg. Anyway. Men tað var ikki langt frá, at hesin sangur var tann besti hetta kvøldið, tí fleiri fólkið fóru uppá gólv og byrjaðu at dansa.

Tá Teitur nevndi, at hann fór at spæla "Louis Louis", frøddust fólk óført. Tey mundu hava onkran kunnleika til Teitur frammanundan, og tað í sær sjálvum er ikki snedigt. Hann hevur jú verið á altjóða tónleikapallinum í fleiri ár. Hann hevur spælt lagið so mikið ofta, men tað vóru eingi tekin uppá sløsheit, og fyri meg var hetta besti sangurin hetta kvøldið, eftirfylgjandi við einum kanska meira anonymum "So don´t let me fall in love with you".

Seinasta lagið (tað segði hann í hvussu so er!!!) hetta kvøldið var "The Singer". Teiti settið seg við klaveri, og treiv í "I always had the voice, and now I am aaaaaa singer ..." Fyri meg var hetta THE hæddarpunkt hetta kvøldið. Framførslan var ógvuliga innilig og ljósið á pallinum komplimenteraði so væl við lagið, at tað var ikki bert eitt lag ein hoyrdi, men ein heildaruppliving fyri sansirnar. Tað var ikki bara eg, men tað sást á áhoyrarnum, at hetta var ein serlig uppliving.

## Bara spiki vantaði

Eg veit ikki um um Teitur altíð hevur eitt obligatoriskt eyka sett, men tað er jú vanligt, at bólkar ikki enda, tá teir siga at "hetta er síðsti sangurin í kvøld", men Teitur var ikki meira enn farin av pallinum, tá fólk byrjaðu at rópa og klappa hann um framføra fleiri løg. Lítil løta gekk, og øll manningin var aftur á pallinum. Fyri meg virkaði tað, sum um at tað bólkurin hevði fyrireikað seg uppá tað.

Løgini, ið teir framførdu vóru "I run the carousel" og nýggja lagið hjá Teiti, sum er á bretsku útgávuni á The Singer "My only companion". Hetta er eitt ógvuliga gott og spennandi lag. Tað ber til millum annað at hoyra tað á Myspace-síðuni hjá honum. Hetta lagið var veruliga tað seinasta lagið hetta kvøldið. Og kvøldið endaði sum tað byrjaði. Teitur einsamallur á pallinum.

Tað kom týðiliga fram hetta kvøldið, at Teitur hevur eina sera dugnaliga manning aftanfyri seg til hesa konsertferð, og tað hoyrdist væl. Konsertin var væl framførd, hóast teir uttan iva fara at blíva enn betri samanspældir sum tíðin líður. Um hølið og mixingin høvdu verið betri, kundi framførslan fingið prikkin yvir i´ði.

Endin var sostatt komin á hesum frálíka "Føroya kvøldinum" í Leeds, bara uttan grind og spik og skerpikjøt.